Fuglafjarðar kommuna

530 Fuglafjørður · Føroyar Tlf. 444006-444374 · Telefax 444657

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
100 Tórshavn

J.nr.: F.K. 00-52-019
Dato:17. januar 2007
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglafjordur.fo
Heimasíða: www.fuglafjordur.fo

**Umsókn um tunnilsgerð av Kambsdali-Millum Fjarða.**

Fuglafjarðar kommuna søkir við hesum skrivi háttvirda Føroya landsstýri/Føroya løgting um loyvi at gera ein umleið 2.300 metra langan ferðslutunnil millum Kambsdal og Skálabotn (Millum Fjarða).

Ætlanin er at nýta sama bygnað og fíggjarliga leist, sum nýttur verður í sambandi við Skálafjarðatunnilin, tað vil siga at eitt partafelag skal eiga og reka Kambsdalstunnilin", tá ið komið er so langt áleiðis.

*Eisini verður biðið um loyvi til:*

1. At linjuføringin verður, sum víst á hjálagda kortskjali nr. 2.
2. At binda tunnilin í landsvegakervið báðumegin tunnilsmunnarnar.
3. At krevja upp bummgjøld fyri øll akfør, ið koma at nýta tunnilin.

Hjáløgd verður send hesi skjøl:

- Umsókn um tunnilsgerð, dagfest 17. januar 2007.
- Kort.
- Viðmerkingar til málið.

Annars eru umboð fyri kommununa altíð tilreiðar at koma á fund við Vinnumálaráðið fyri at lýsa málið nærri, eitt nú við undirbyggjandi skjalatilfari.

***Avrit av hesum skrivi er sent***: Føroya løgtingi og Landsverk.

Vinarligar heilsanir

Sigurð S. Simonsen
borgarstjóri

// Jákup Frants Larsen
býráðsskrivari